# Bárður Oskarsson fingið barnabókavirðisløn Útnorðurráðsins

**Aftrat sínum eyðsýndu dygdum, er bókin eisini nýskapandi í norðurlendskum barnabókaskaldskapi, bæði hvat viðvíkur teksti og tekningum. Soleiðis ljóðar partur av grundgevingunum fyri at geva Bárði Oskarsson barnabóksvirðisløn Útnorðurráðsins í dag**

BÓKMENTA-VIRÐISLØN
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Í dag fekk Bárður Oskarsson handaða barnabókavirðisløn Útnorðurráðsins fyri bókina „Ein hundur, ein ketta og ein mús“. Aftrat heiðrinum fær Bárður Oskarsson 60.000 krónur.

Í grundgevingunum fyri avgerðini verður millum annað staðfest, at aftrat sínum eyðsýndu dygdum, er bókin eisini nýskapandi í norðurlendskum barnabókaskaldskapi - bæði hvat viðvíkur teksti og tekningum.

Bárður Oskarsson hevur sjálvur skrivað og myndprýtt bókina, og sum heitið á bókini eisini boðar frá, so snýr bókin seg um ein hund, ein kettu og eina mús.

Dómsnevndin sigur í grundgevingum sínum, at søgan er einkul og gjøgnumførd, og tekningarnar eru einklar men fullar av stuttligum detaljum.

Dómsnevnd Útnorðurráðsins sigur, at talan er um eina barnavinarliga uppgerð við tann dupultmoralska korrektleikan, sum merkir tey nýtímans heim, ið skýggja ósemjur.

## FAKTA

**Fakta um Vestnordisk Råds Børne- og ungdomslitteraturpris 2006:**
Í dómsnevndini sita:
Helena Dam á Neystabø
Silja Aðalsteinsdóttir, Ísland
Vera-Lise Olsen, Grønland

Virðislønin verður latin annaðhvørt ár, og varð ein bók frá Grønlandi, Íslandi og Føroyum innstillað til heiðurin í desember í 2005.
30. juni í ár varð avgjørt, at vinnarin varð „Ein hundur, ein ketta og ein mús“ eftir Bárð Oskarsson, og tað varð kunngjørt á Hotel Føroyum í dag.

### Stórur heiður

Bárður Oskarsson er búsitandi í Danmark, men er í Føroyum í løtuni. Hann er errin um at fáa hesa virðislønina.

– Hetta er ein stórur heiður, og við hesum eri eg nú komin í eitt fínt selskap, segði Bárður Oskarsson, tá Sosialurin fekk orðið á hann í dag, og sipaði til, at áður hava Andri Snær Magnason, Kristín Steinsdóttir og Halla Sólveig Þorgeirsdóttir fingið sama heiður, sum hann nú hevur fingið.

Sambært dómsnevndini hjá Útnorðurráðnum, hevur Bárður Oskarsson megnað at vent tiltikna stríðnum millum hundin og kettuna, og kettuna og músina á høvdið.

– Við tað, at eg havi brúkt hesar tríggjar figurarnar, eri eg sloppin undan fortelja so nógv, ið onnur longu hava fortalt framman undan. Harvið havi eg kunna latið søguna arbeitt fyri sær sjálvari, og tað er helst ein partur av orsøkunum til, at so nógv dáma bókina, sigur Bárður Oskarsson.

### Meiri í umbúna

„Ein hundur, ein ketta og ein mús“ er veruliga ein bók, sum er fallin í góða jørð nógva staðni. Hon er umsett til bæði franskt og íslendskt, og á bókamessu í Italia í fjør vakti bókin eisini stóran ans.



*Bárður Oskarsson hevur skrivað og myndprýtt bestu barnabók og ungdómsbók í útnorði í 2006*

*Mynd Álvur Haraldsen*

Bárður Oskarsson heldur, at heiðurin hann nú hevur fingið, kann brúkast til at føra bókina fram aðrastaðni eisini.

Men hóast bókin er so vælumtókt, so hevur Bárður Oskarsson ikki í hyggju at gera eina uppfylgjandi bók til „Ein hundur, ein ketta og ein mús“.

– Tað er ikki ætlanin at gera nakra uppfylging til bókina, men har er ymiskt annað ávegis, og helst skuldi okkurt komið út eina ferð í mars, sigur Bárður Oskarsson, sum í fjør eisini fekk handaðar 60.000 krónur, sum gávugóðs úr grunni Thorvalds Poulsen fyri júst hesa bókina, og hinar hann hevur myndprýtt.

# Stórur áhugi var fyri fiskikappingini

**Tá ið fiskikappingin var av, fóru børnini við línuskipinum, Ågot, út í Kalsoyarfjørð at kasta fløskupostar**

SJÓMANNADAGUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Hóskvøldið varð skipað fyri fiskikapping fyri børnum á Kósabrúnni í Klaksvík.

Fiskikappingin, sum varð skipað í sambandi við Føroya Sjómannadag, fekk stóra undirtøku.

Nógv børn og foreldur vóru á Kósabrúnni hesa løtu, meðan kappingin fór fram, og lagið var gott.

Børnini vóru ágrýtin, og tá ið fongurin skuldi vigast, høvdu tey Finn Baldvinsson til hjálpar, sum vigaði fiskin fyri tey.



*Fongurin verður vigaður, og nú hava tey Finn Baldvinsson at hjálpa sær*

*Mynd: Anton K. Højgaard*

### Fløskupostar

Tá ið fiskikappingin var av, og fongurin vigaður, fóru børnini út í Kalsoyarfjørð við línuskipinum, Ågot, at kasta fløskupostar.

# Granskarar í Norðurlandahúsinum

**Tríggir av granskarunum, sum skulu vera við á rannsóknarferðini Galathea 3, greiddu í Norðurlandahúsinum í gjár frá sínum granskingarvirksemi umborð á Vædderen**

GALATHEA 3
*Orð & mynd*
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Í gjár skipaði Galathea 3 fyri almennum tiltaki í Norðurlandahúsinum, har greitt var frá søguni hjá Galathea 3 og tríggir av granskarunum umborð á Vædderen greiddu frá sínum virksemi.

Teir tríggir fyrilestrarhaldararnir høvdu 20 minuttir hvør at greiða frá sínum virksemi, og Lone Gram var tann fyrsti, sum fekk orðið.



Hon greiddi frá, at tað hon serliga er áhugað í tí, tey nevna Roseobacter-bakteriur, og hví tann bólkurin er so sterkur.

Lone Gram greiddi frá, at tey fara at gera royndir av vatni, á slangum, fiski, skjaldbøkum og hvalspýggjum.

Úr teimum royndunum ætla og vóna tey at finna evni, ið kunnu brúkast at menna antibiotika, konserveringsevni ella probiotika til fisk.

Stig Markager var annar fyrilestrarhaldarin og hann greiddi frá, at hann granskaði í tí, sum vit kunnu kalla havsins mold, ella tað sum á fakmáli eitur upployst organisk evni. Teirra royndir verða gjørdar út frá vatni, ið verður tikið upp í bátin ymsa staðni á leiðini.

Seinasti fyrilestrarhaldarin var Nikolaj Blom, og hann granskar í tí, ið hann kallaði polarhavsins DNA. Hann vónaði at finna evni, ið møguliga kunnu brúkast sum partur av læknaevnum.

Amboðið, sum allir granskararnir brúka á rannsóknarferðini er ein sokallaður vatnheintari. Síðani er ymiskt hvussu og hvat vatnið verður brúkt til, og fyriliggur heilt stóra arbeiðið ikki fyrr enn granskararnir koma í land, og fara at viðgera royndirnar.